SKÁLAFJARÐAR SLØKKILIÐ 1971

# UMSÓKN UM LOYVIÐ TIL BRÚK AV FYRIBILS GISTINGAR HØLUM

| | | |
|---|---|---|
| Stað at gista, navn og adressa: | Umsóknir skula sendast inn, 7 dagar áðrenn gisting skal fara fram. | |
| Dato fyri gisting | | |
| Tal av persónum sum gista: (vaksin + børn) | | |
| Hvørjum rúmum verður gist í: Hvar í bygninginum? | | **Minst til:** í rúmum, sum eru størri enn 75m², skal góðkendur sovipláss planur hanga uppi. |
| Navn og fartelefon nr. Hjá ábyrgdarpersóni: | | |
| Teldupostur: | | |
| Aðrar viðmerkingar | | |
| Dato: | Undirritaði hevur lisið og er kunnigur við viðløgdu vegleiðing. Undirskrift: | |

TRYGDARREGLUR OG LOYVI TIL FYRIBILS GISTING
BYGDAHÚSIÐ Á STRONDUM

Fyribils gisting er at skilja sum gisting í í mesta lagi fimm dagar.

Meting og treytir taka støðu í donsku reglunum um "Midlertidig overnatning".
Talan er um loyvi til fyribils gisting fyri fleiri enn 10 fólkum í hølum, sum ikki eru innrættað til endamálið.

Gistingarmøguleikin í bygdahúsinum er:

| | |
|---|---|
| Høllin: í mesta lagi | 73 fólk (tekning yvir soviætlan og rýmingarvegum) |
| Matarhøll: | 10 fólk |
| **Samlað:** | **83 fólk** |

Er talan um persónar, sum eru 16 ár ella yngri, skal vera fast vakin vakt!

Í høllini til 76 fólk er neyðugt at gera eina soviætlan, sum vísir sovipláss og rýmingarvegir. Henda skal góðkennast av kommununi/sløkkiliðinum.

**Gistingarmøguleiki er bert góðkendur um:**

- Tilhoyrandi virkin og merkt sløkkiútgerð er til staðar. Slanguskáp, neyðljós, eldsløkkjarar og brandteppi, sum eisini síggjast á leiðbeiningini
- Roykvarnarar skula vera í øllum rúmum har gist verður, og roynast frá byrjan av gisting
- Leiðbeiningin – planskitsa – um útgerð og rýmingarveg úr tilhaldsrúmum og samlistað úti
- At einki stendur í rýmingarvegnum
- Skelti við "Royking bannað" skal vera sjónligt

Kunning um gisting og bygning verður givið leigara eins og álagt verður ábyrgdarpersóni at kunna og hava roynd við rýmingarætlan og samlistaði.

**Kunning til Skálafjarðar sløkkilið:**
Fyri hvørja ferð húsið verður brúkt til fyribils gisting, skal Skálafjarðar sløkkilið í góðari tíð verða kunnað um, nær gist verður og, hvør gistir. Kontaktfólk og telefonnummar.
Sunleif, tlf. 218235 ella Vilhelm, tlf. 214507
skalslok@olivant.fo

Strendur 12. sep. 2012

Sjóvar kommuna
Artur Johansen, borgarstjóri

Skálafjarðar sløkkilið
Sunleiv Højgaard, tilbúgvingarleiðari

# Vegleiðing til ábyrgdarfólk

Uppgávur hjá ábyrgdarfólki fyri bólki, ið gistir.

Ábyrgdarfólk fyri bólk, ið gistir í bygdahúsinum skal:

- Kanna, at roykvarnarar virka eftir ætlan, og at bólkurin er kunnaður um rýmingarleiðir, um so er, at tað verður neyðugt at rýma.
- At bólkurin verður kunnaður um trygdarskipan við rýmingarvegi og samlistaðið, og at talt verður upp úti á samlistaðnum. Eingin má rýma fyrr enn leiðarin gevur loyvi.
- At rýmingarætlan verður royndarkoyrd, soleiðis, at einki ivamál er um mannagongdir.

**Í neyðstøðu, ring 1-1-2**
**Er eldur í – tryggja tær, at øll hava hoyrt alarmin.**
**Far út á samlistaðið eftir rýmingarætlan.**

**Her ert tú:**
**Bygdahúsið á Strondum**
**Fløtuvegur 90**
**490 Strendur**